# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**



**MAZDA DEMIO 1,5 GLX AUT**
Árg 10-Jan, Km 8.000. Kr. 120.000.



**MAZDA 323 S 1,6I GLX**
Árg Apr-96, Km 90.000. Kr. 52.000.



**MAZDA 323 2,0 DIESEL**
Árg Apr-99, Km 102.000.
Kr. 102.000



**MAZDA 626S 1,8I LX**
Árg Okt-97, Km 71.000. Kr. 100.000



**MAZDA 626 2,0I LX**
Árg Apr-99, Km 92.000. Kr. 130.000



**MAZDA 626 2,0I GLX**
Árg Mei-97, Km 88.000. Kr. 85.000.



**NISSAN PRIMERA 1,6 SI**
Árg Jan-99, Km 69.000. Kr. 117.000



**DAEWOO LANOS 1,5 SE**
Árg Mei-99, Km 68.000. Kr. 70.000.



**BMW 520I**
Árg Mar-95, Km 101.000.
Kr. 105.000



**KIA SEPHIA 1,5 GLX**
Árg Jan-97, Km 94.000. Kr. 65.000.



RK792
**HYUNDAI MATRIX**
Árg 05-Feb, Km 30.000. Kr. 120.000



TE019
**OPEL CORSA 1,4I 16V**
Árg Jan-97, Km 57.000. Kr. 65.000.



AJ328
**OPEL ASTRA 1,6**
Árg Aug-98, Km 101.000.
Kr. 105.000



BE503
**SUZUKI BALENO 1,6I GLX**
Árg 02/00, Km 49.000. Kr. 96.000.



**SKODA OCTAVIA 1,6 GLX**
Árg 12/00, Km 37.000. Kr. 125.000.



**TOYOTA COROLLA 1,3 H/B**
Árg Nov-99, Km 92.000. Kr. 85.000.



**TOYOTA COROLLA 1,6 SOL**
Árg 11-Jan, Km 24.000. Kr. 150.000



**TOYOTA AVENSIS 2,0 TD SOL**
Árg Apr-99, Km 78.000. Uttan bítisbil - 20000. Kr. 160.000.



**TOYOTA CAMRY 2,2 GL AUT**
Árg 05/00, Km 128.000. Uttan bítisbil - 20000. Kr. 160.000.



**RENAULT MEGANE 1,6E CLASSIC**
Árg Apr-99, Km 90.000. Kr. 98.000.



**CITROEN XSARA 2,0 HDI**
Árg 06-Jan, Km 34.000.
Kr. 140.000.

**MAZDA B2500**
Árg 10/00, Km 52.000. Kr. 115.000.

**BERG MOTORS**
**Staravegur 1-3 • Tel. 31 35 35 • Fax 31 77 35**



**FORD FOCUS STATIONCAR 1.8 TURBO DIESEL**
Árg 16.maj 2002, Km 41.000. Sera vælhildin - Centrallás- El.Rútar-Hita í forrúti - Hita í Forsetrum - Radio v.bandsp. V.m. Bert 1.ár og 4. mánaðir. Seldur vegna keyp av 7.pers. bili. Kr. 180.000.



**KIA SEPHIA 1.5 GTX**
Árg Apr-97, Km 62.600. Fjarðstýrt centrallás-El.rútar-El-spegl Spoylara aftan v.m.Sera vælhildin. Kr. 66.000



**KIA SEPHIA 1.5 GTX**
Árg Mar-97, Km 150.000. Fjarðstýrt centrallás-El.rútar-El-spegl-Spoylara aftan- Alufelgur- v.m. Tilboð uttan bil í býti kr. 56.000. Kr. 66.000.



**SUZUKI WAGON R 1.2**
Árg Maj 00, Km 42.000. C.D Anlegg- El rútar- El.spegl-Síðuspoylarar- Takspoylara- sleipikrók- píkadekk v.m. Tilboð uttan bil í býti kr. 75.000,00. Kr. 86.000.



**ROVER 620 SI**
Árg Jun-99, Km 81.000. Sera vælhildin Aircondition-Alufelgur-Fjarðstýrt centrallás- El Rútar-El Spegl v.hita. C.D.Anlegg v.m. Kr. 160.000.



**TOYOTA LANDCRUISER DIESEL**
Árg Maj 1986, Km 136.000. Innregistreraður sum persónvognur.
Kr. 28.000.



**HONDA CRV 4.WD PERSÓNVOGNUR**
Árg Jun-99, Km 62.000. Sera vælhildin: Alufelgur-Fjarðstýrt centrallás- El Rútar-El Spegl - C.D. Anlegg v.m. Kr. 165.000.



**HONDA CIVIC**
Árg Sept .2001, Km 20.700. Aircondition - El.rútar - El.spegl v.hita - Radio - Fjarðstýrt centrallás v.m. Sum nýggjur. Kr. 145.000.



**FORD ESCORT 1.8 DIESEL SEDAN**
Árg Okt. 95, Tilboð uttan bil í býti kr. 50.000,- Nýsýnaður. Kr. 60.000.



**ROVER 620 GSDI 2.0 T.DIESEL**
Árg Dec. 99, Km 146.800. Leður setur- Aircondition- Fjarðstýrt- centrallás- El. Sóltak- El. rútar- El. spegl Alufelgur v.m. Selist fyri kunda, fluttur uttanlands. Kr. Tilboð 140.000



**KIA K 2700 LASTVOGNUR KING CAB 2700 DIESEL 3.200 KG**
Árg 21. Juni 2001, Km 42.500. Aircondition - Centrallás - C.D. Anlegg - Sleipikrók- Differentiale sperru - eyka tectylviðgjørdur - Klæddur við plátum innv. í lastini. v.m. Nýprísur: 190.300,-. Kr. 120.000.

Pf. D. B. Bilar
**Jónas Broncksgøta 15**
**Tel. 310600 - Fax 310650**





**MERCEDES BENZ 230 TE 7 PERSÓNA STATIONCAR.**
Árg Jun-91, Km 117.000. Rúmligur 7 persónabilur familjubilur til sølu.

Bilurin er í sera góðum standi. Nýsýnaður, eyka felgur við píkadekkum fylgja við, nýtt útstoyt (komplett), nýggjur akkumulator, nýggjar bremsuskivur framman og nýggjar el-rútavindarar. Søluprísur kr. 149.000.
**Nærri upplýsingar fáast við at ringja á tlf. 216135**



**BMW 320 D**
Árg okt.1998, Km 89.000. Diesel bilur til sølu í sera góðum standi til sølu um hóskandi boð fæst.
**Telefon 311960**

## Toyota Landcruiser



árg. 11/96, koyrt 179.000 km, bláur v/ sportfelgum til sølu fyri 155.000 kr v/mvg.

**Tlf. 22 11 76**

**VIÐMERKINGAR**

# Heini O. Heinesen hevur ikki brúk fyri at tváa sínar hendur

**Heini O. Heinesen**



Í Sosialinum nú ein dagin skuldsetir Jógvan Lútzen meg fyri at vilja tváa mínar hendur í málinum um gamla Ågot.

Eg havi ikki brúk fyri at tváa mínar hendur. Tað einasta, ið landstýrismálanevndin, har eg eri formaður, hevur gjørt, er at taka støðu til eina beinleiðis kæru frá Felagnum Línuskipum.

Niðurstøðan hjá Landsstýrismálanevndini var, at tað, sum varð farið fram, var ikki eftir lógini.

Men tað er ikki landsstýrismálanevndin, sum hevur tikið fiskiloyvið aftur. Landsstýrismálanevndin er fyrr komin til ta niðurstøðu, at landsstýrismenn hava borið seg skeivt at, men eg kenni onki til, at Landsstýrið fyri tað hevur sett tiltøk í gildi, afturvirkandi, so at loyvi eru tikin aftur og at tað sostatt hevur fingið avleiðingar fyri vanligar borgarar.

Nei, sannleikin er tann, at tað er ein landsstýrismaður, sum einsamallur gav gamla Ågot fiskiloyvi dagin fyri seinasta løgtingsval, eftir eina express viðgerð í Fiskimálaráðnum, sum tók minni enn eina viku.

Men tað var ikki fyrrenn eitt ár seinni, at eigararnir fóru at brúka pening upp á gamla Ågot og nú var tað sjálvur Løgmaður, sum umsat fiskivinnumál.

Spurningurin er, hvussu hetta hongur saman, tí áðrenn tað var tað dult sum mansmorð, at loyvið yvirhøvur varð givið.

Og tað svitast heldur ikki, at tað var ein landsstýrismaður hjá fólkaflokkinum, sum einsamallur tók fiskiloyvið aftur.

Tí er tað langt úti at turka hetta upp í Heina O. Heinesen.

Tað er Landsstýrismaðurin einsamallur, sum hevur ábyrgdina av sínum gerðum, sama hvat einstakir politikararar siga. Í dag hava allir landsstýrismenn fulla ábyrgd av teimum avgerðum, teir taka og tí kann ongin áleggja landsstýrismanninum í fiskivinnumálum at geva eitt fiskiloyvi og ongin kann áleggja honum at taka tað aftur. Skuldi tað borið til, hevði tað verið at tikið ábyrgdina frá landsstýrismanninum og tað havi eg ongan áhuga í.

Eitt annað er so tað, at øll vita, at tað fiskiloyvið til gamla Ågot var ólógligt. Gamli Ågot var av teimum stóru línuskipum og nú kemur hann aftur í flotan sum útróðrarbátur. Hetta er at taka grundarlagið undan fiskidagaskipanini og teimum bátum, sum eru í útróðrarbólkinum frammanundan.

Hagtølini yvir veiðina undir Føroyum vísa, at veiðitrýstið hjá bólki fýra, útróðrarbólkinum, eftir toski og hýsu, er vaksið 8% síðani 1998 - og tá er gamli Ågot ikki taldur við. Skuldi lógin verðið fylgd, skuldu fiskidagatalið í bólkinum verið lækkað tilsvarandi, men tað haldi eg ikki er nøkur gongd leið.

Bara tað átti at kunna sagt fólkaflokkinum eitt og annað og eg ivist ikki í, at ein onnur landsstýrismálanevnd hevði komið til somu niðurstøðu.

Ístaðin fyri at hongja seg í hetta eina fiskiloyvið, átti landsstýrismaðurin heldur at litið frameftir og lagt uppskot fyri Løgtingið um at broyta lógina, so at vit fáa heilt greiðar mannagongdir.

# So eru politikararnir aftur uppá spæl

**Alti S. Justinussen**
*Árnafirði*

Flest øll í samfelagum eru vitandi um at búskaparvøksturin er steðgaður. Men ætla teir sum nú stýra skútuni aftur at stýra beint inn í illveður, eins og gjørt bleiv fyrst í 90-unum og at koyra hetta samfelagið í kreppu aftur. Tá ávísir bankar máttu snara lykilin um, sjálvt um tað ikki var neyðugt, og aðrir blivi tømdir av ríkmonnum, soleiðis at allir teir føroysku skattaborgararnir máttu svíða. Hetta sær ikki mætari út, sum at tað sama fer at endurtaka seg, nú ávaringarljósini langt um leingi eru farin at blunka, og politikararnir eru í villareiði, við tað at teir seta gjøld á ávísar vørur, tað er tað sama sum skattur.

Vælsignaðir, hví lærdu tit ikki av kreppuni, longu nú er tann almenni sektorurin bølnaður, samstundis sum tit góvu dønum knappar 400 milliónir í gávu hvør ár, og nú eru røddir frammi um, at fáa statin at lækka rentuna. Nei, nú er at vísa ábyrgd.

Eitt máttu tit vita, at tað er í góðum tíðum at fólkið hevur ráð at gjalda skatt, og í ringum tíðum, at fólkið hevur brúk fyri skattalætta, so leggi ikki meira byrðar á Føroya fólk, lækki heldur tykkara egnu løn, spari uppá uttanlandsferðir, spari uppá sterkar løgir hvørja ferð okkurt er á skránni og minka tann almenna sektorin, soleiðis at javnvág kemur uppá tær milliónirnar sum danir fáa hvør ár.

Við loysingarkvøðu, men við skili.

# Einmansleikurin »Den enes brød« á føroyskan pall

TÍÐINDASKRIV

13. september, kemur danski sjónleikarin Lars Dammark til føroyar við einmansleiki sínum "Den enes brød". Teir fyrstu dagarnar fer hann út á ymiskar miðnámsskúlar at framføra, men seinni vera so tvær almennar sýningar. Onnur almenna sýningin verður í Runarvík (í Runarvíkar skúla) tann 18 sep. kl 19.00, og hin niðri í Meiarínum í hølunum hjá Grímu leygardagin tann 20 sep. kl 20.00.

Heilt stutt er søgan í leikurin hendan: Ein ungur maður kemur veltandi inn í eitt vertshús. Hann hevur verið til jarðarferð hjá sínum besta vinmanni. Hann roynur nú við øllum brøgdum at greiða frá, hvussu tað heila byrjaði, men verður allatíðuna avbrotin av sínum egnu associatiónum, og má venda aftur til útgangsstøði. Her vera tað meira orðini, ið gerast harri á manninum enn tað øvugda, og áskoðarin verður drigin inn í eitt sera hugvekjandi orðaspæl, ið serliga snýr seg um mótsetningarnar: lívið og deyðin.

Danski rithøvundurin Hendrik Skov Nielsen hevur skriva leikin. Leikurin hevur fingið sera góð ummælið í donskum bløðum.

Leikurin varðar uml. 1 tíma og kostar 100 kr. Bólkar við 5 pers. og meira sleppa tó fyri einans 80 kr. per persón. Atgongumerki fáast í kunningarstovuni og ein tíma undan sýning.

# Heðin Mortensen á ST-aðalfund

**Mánadagin fer Heðin Mortensen, løgtingsmaður, til New York, har hann skal vera við á aðalfundinum hjá Sameindu Tjóða**



*Heðin Mortensen skal næstu tíðina umboða føroyingar í New York*

Tað eru 160 mál á skránni fyri aðalfundin hjá ST, sum verður settur tann 16. september. Vanligt hevur verið, at umboð fyri Føroyar og Grønland hava verið við í donsku sendinevndini á ST-aðalfundum, og í ár verður tað Heðin Mortensen Mortensen, løgtingsmaður, sum fer at umboða Føroyar fyrru helvtina av tíðini, aðalfundurin varðar.

Málini, sum verða viðgjørd á aðalfundinum í ár, eru býtt upp í bólkarnar: altjóða yvirgangur, friður, trygd og altjóða rættarskipan, búskaparligir og sosialir spurningar, humaniterir spurningar, mannarættindi og stovnsligir og fíggjarligir spurningar.

Danska sendinevndin hevur fund hvønn morgun kl. 9, og síðani skulu luttakararnir vera til staðar á fundunum, har málini verða viðgjørd.

Seinastu dagarnar áðrenn heimferðina verður vitjað í Washington, D.C. Har verður millum annað vitjað í Kongressuni, í Pentagon og í Heimsbankanum. Ferðin endar tann 16. oktober.